HB-ÍF 3-2 (1-1):

# Fuglfirðingar mugu stríðast

**ÍF fekk eina harðliga ávaring frá HB um, at stríðast skal fyri hvørjum stigi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mett eftir úrslitunum, sum hava verið í steypakappingini, hevur lítil og eingin ivi verið um, hvat lið er hitt sterkasta í aðru deild. ÍF hevur í steypakappingini givið fleiri av feløgunum í bestu deildini harða mótstøðu, og fáur ivaðist undan kappingini í, at liðið var heitasta uppflytaraevnið.

## Gloymdu stríðið

Møguliga hava fuglfirðingarnir eisini hildi sjálvir, at so var, men dysturin leygardagin vísti teimum so, at teir ikki skulu rokna við, at eitt hitt einasta stig fer at koma av sær sjálvum.

Við skilagóðum og einføldum spæli syrgdu næstbestu leikararnir hjá HB fyri, at fuglfirðingar máttu heim við ongum. Heimaliðið legði stóran dent á verjupartin, meðan álopsparturin í stóran mun varð bygdur á langar bóltar fram til teir báðar fótfimu áleypararnar, Gunnar Mohr og Eyðun Samuelsen.



*Gunnar Mohr taldist eina ferð millum vandamestu áleypararnar í landinum, og hóast hann nú hugnar sær í aðru deild, hevur hann framvegis máltev sum fáur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyrsta málið í dystinum var tó eingin av teimum maður fyri. Uppspælið kom úr høgru síðu, og tá bólturin var sendir flatt inn, smekkaði Rógvi Joensen til. Tomek syrgdi við einum máli fyri, at fuglfirðingarnir ikki mistu takið á nøkrum undan steðginum, men í seinna hálvleiki sýndi Gunnar Mohr aftur, hví hann í nógv ár varð roknaður millum vandamiklastu framherjarnir í landinum.

Fyrst fekk hann ein bólt við sær móti málinum. Staddur beint við brotsteigarmarkið smekkaði hann til, uttan møguleika hjá málverjanum at gera nakað. Eftir hornaspark fekk Høgni á Lakjuni aftur javna fyri ÍF, men fyrrverandi HB-formaðurin gav ikki soleiðis skarvin yvir. Við enn einum máli – meinlíkt tí fyrra – setti hann punktum fyri dystinum, og meðan HB leikararnir fegnaðust um tey trý stigini, kundu gestirnir hugsa um, hvat tað var, sum gekk galið.

Allar helst verður niðurstøða teirra, at teir ikki arbeiddu nóg nógv fyri sakini hendan dagin. Nakað sum ofta verður rópt fyri ein deyðssynd, men so illa nýtist tað tó ikki at ganga hjá ÍF. Enn eru 17 dystir eftir at spæla, og einki er at ivast í, at leikararnir fara at gera sítt til at fáa eina munandi úrtøku úr hesum.

Sumba – B36 1-2 (1-1):

# Ring byrjan hjá sumbingum

**Niðurflytararnir úr Sumba fingu ikki ta byrjan, teir høvdu vónað, tá B36 vann 2-1 suðuri á Krossinum sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Eftir at hava spælt 1. deildar fótbólt í trý kappingarár á rað, eru sumbingar aftur at síggja í næstbestu deildini. Men hóast hollar royndir úr bestu deildini, eydnaðist teimum ikki at vinna á næstbesta liðnum hjá B36.

Heldur óvæntað streyk útiliðið avstað við øllum stigunum, tá havnarliðið var á vitjan í Sumba.

Tað var annars heimaliðið, ið legði fyri við málskjótingini, tá fimm minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki. Sumba setti eitt mótálop í gongd, sum endaði við, at bólturin heldur tilvildarliga datt fyri føturnar á Eirik Joensen, ið stóð leysur. Eirik helt høvdið kalt og sendi framvið málverjanum, og so var heimaliðið frammanfyri.

## B36 svaraði aftur

Fyri málið hjá sumbingum var tað heldur B36, ið hevði verið naskari í sínum málroyndum, men teir høvdu ikki eydnuna við sær.

Hóast hvøkkin megnaði B36 at svara aftur beinanvegin. Tveir minuttir fyri steðgin fekk Gunnar Nielsen fatur á bóltinum nakað væl uttanfyri brotsteigin. Hann gjørdi ikki mætari enn at royna seg langt úti frá við vinstra beini, og bólturin streyk framvið málverjanum. Vakurt mál.

Nakað av vindi var omaneftir vøllinum í Sumba sunnudagin. Í seinna hálvleiki hevði heimaliðið vindin við sær, og tí var tað mesta av spælinum niðri á hálvuni hjá B36. Tað var tó B36, ið fekk einasta málið eftir steðgin.

Heini í Skorini setti eitt álop í gongd á egnari hálvu, sum endaði við, at Gunnar Nielsen royndi seg við skoti. Málverjin hjá sumbingum Rúni Lisberg hálvbjargaði, og har var Heini í Skorini aftur og høvdaði sigursmálið fyri B36.

Sumba legði trýst á B36-málið í seinna hálvleiki, og teir spældu seg eisini fram til nakrar møguleikar. Men B36-málverjin Janus í Stórustovu hevði fleiri góðar bjargingar, sum forðaðu sumbingum at fáa útjavnandi málið.

Sumba fekk tó bóltin í málið einaferð. B36-ari varð dømdur rangstaddur og fríspark var til Sumba, sum sendi nógv fólk fram í brotsteigin hjá B36. Ein sumbingur sendi frísparkið av egnari hálvu móti málinum. Bólturin var tikin av vindinum, snýtti bæði verjuleikarar og málverja og endaði í málinum. Tey flestu hildu, at Sumba hevði javnað í seinastu løtu, men dómarin gjørdi vart við, at talan var um eitt óbeinleiðis fríspark, og hann kolldømdi tí málið.

B36 megnaði at halda leiðsluna og fór avstað við báðum stigunum. Hetta má sigast at vera eitt sera gott úrslit hjá havnarmonnum og ein góð byrjan uppá kappingarárið.

**Sumba – B36 1-2 (1-1)**
1-0: Eirik Joensen
1-1: Gunnar Nielsen
1-2: Heini í Skorini

NSÍ-Skála 2-5 (0-3):

# Flúgvandi byrjan

**Nýggja liðið í aðru deild, Skála, fekk eina flúgvandi byrjan, tá teir á útivølli vundu burtur úr NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Skála hevur seinnu árini havt eina heldur umskiftiliga tilveru, sum annað hvørt hevur verið sum oddalið í triðju deild, ella botnlið í aðru deild. Undan hesum árinum varð tó sagt, at nú skuldi vend koma í. Nýggjur venjari varð fingin til vega, og hóast tað enn er nakað tíðliga at meta um endaliga úrslitið, so fekk liðið undir øllum umstøðum eina dreymabyrjan.

## Javnt spæl

Skála vann nevnliga ein tryggan 5-2 sigur á runavíkingunum, og eitt skifti var støðan fimm-null til gestirnar, so eftir hesum at døma var talan um ein sera sannførandi sigur.

Sjálvir halda teir á Skála tó ikki, at tølini tala somikið týðiligt í hesum førinum.

- Eg haldi, at talan var um ein hampuliga javnan dyst, men munurin millum liðini var tann, at vit vóru nógv effektivari.

Soleiðis sigur Kaysten Rasmussen, sum sjálvur setti punktum fyri málskjótingini hjá Skála, tá hann í seinna hálvleiki skoraði fimta skálamálið. Hann heldur annars, at hóast NSÍ hevði bóltin nógv, so skaptu teir so at siga ongar møguleikar, og uttan hesar er sjálvandi torført at fáa mál.

Ananrs høvdu Pauli Hansen og Bogi Gregersen (2 mál) sent gestirnar á sigurskós í fyrra hálvleiki, meðan Alexandur Johansen og so Kaysten Rasmussen syrgdu fyri málunum í seinna hálvleiki. Tá var alt at kalla avgjørt, og hóast Bergur Djurhuus og Áki L. Hansen fingu minkað um munin, so kom sigurin hjá gestunum ongan tíð í vanda.



VIÐMERKINGAR

# Nýggja ætlan landsstýrisins hongur ikki saman



*Kári Petersen*
*búskaparfrøðingur*

*Ætlan landsstýrisins um at avtaka heildarveitingina eftir 12-15 árum er framvegis óforsvarlig. Um roknað verður við realistiskum fyritreytum kemur hallið hjá landskassanum eftir fáum árum uppá 5-600 milliónir krónur.*

*Útrokningarnar vísa, at fyri at landsstýrið skal kunna náa sínum máli um at gera føroyska búskapin óheftan av ríkisveitingini umleið ár 2012-15, so skulu rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum als ikki veksa komandi 15 árini. Um ein ynskir at gera føroyska búskapin óheftan av ríkisveitingini um 25-30 ár, so skulu útreiðslurnar ikki veksa við meir enn 1 prosenti árliga.*

*Sitandi landsstýrið hevur økt útreiðslurnar við góðum 5 prosentum árliga. Harvið hevur landsstýrið gjørt føroyska búskapin enn meira heftan av ríkisveitingini enn hann var frammanundan.*

*Flestu føroyingar taka undir við at gera Føroyar meira búskaparliga óheftar av ríkisveitingunum. Um hetta skal eydnast, so eiga politisku myndugleikarnir at konsentrera seg um stýra tí einasta, teir veruliga kunnu stýra, nevniliga útreiðslunum.*

**1. Landsstýrið onga útrokning gjørt.**

Tey sum hava fylgt við í politikki seinastu árini hava sæð, at øll lógaruppskot, sum vera løgd fyri tingið hava eina frágreiðing til endans sum greiðir frá hvørjar fíggjarligar fylgjur standast av uppskotinum. Men ongin tílík ætlan fylgir við nýggja fullveldisuppskotinum hjá landsstýrinum.

Landsstýrið hevur hóast áheitanir ikki vilja lagt slíkar konsekvensrokningar fyri tingið. Uppskotið snýr seg annars um at minka stuðulsveitingarnar úr Danmark við 1200-1300 mió. kr., og tað átti tí at verið sjálvsagt, at landsstýrið kunnaði Føroya fólk um, hvussu landsstýrið ætlar sær at fáa endarnar at røkka saman. Hetta átti at verið gjørt áðrenn landsstýrið fer til Danmarkar at samráðast um yvirtøkur og minking av heildarveitingini.

Sitandi landsstýri, sum áður hevur gjørt kunningarherferðir um fullveldisætlanina hevur higartil ikki vilja, duga ella tora at gjørt eina útrokning av, hvørjar fylgjur nýggja fullveldisætlanin fer at fáa, og leggja ætlanina fyri Føroya fólk. Tískil hevur undirritaði gjørt sær tann ómak at gera eina slíka útrokning.

**2. Útrokningarfyritreytir.**

2.1. Búskapargrunnurin.

Undirritaði hevur tikið ætlanina um at gera ein búskapargrunn við í framrokningina. Landsstýrið ætlar at lata heildarveitingina fara inn í ein búskapargrunn. Síðan ætlar landsstýrið at lata henda búskapargrunn stuðla landskassan. Í sær sjálvum er búskapargrunnurin eitt gott hugskot. Men, sæð í einum størri samanhangi, har hugt verður eftir samlaða roknistykkinum fyri landskassan og búskapargrunnin, bøtir búskapargrunnurin ikki um fíggjartrupulleikarnar hjá landskassanum. Tað einasta sum hendir, er, at ríkisveitingin verður koyrd í ein búskapargrunn og at peningur verður fluttur úr búskapargrunninum yvir í landskassan.

2.2. Búskaparvøkstur og vøkstur í inntøkum landskassans.

Ein høvuðsfyritreyt er, at reali búskaparvøksturin (tá inflatiónin er frároknað) verður um 2 prosent um árið uppá longri sikt. (Men nakað minni uppá stutt sikt). Sum lýst í talvuni er hetta vanligi langtíðarvøksturin í vestureuropeisku vælferðarsamfeløgunum seinastu 20 árini. Roknast kann við, at inntøkur landskassans vaksa við sama prosentvøkstri sum búskaparvøksturin. Ein búskaparvøkstur uppá 2% er realistiskur undir vanligum umstøðum. Um stórar almennar skerjingar verða framdar í einum tíðarskeiði, er tað helst ov bjartskygt, at rokna við 2% búskaparvøkstri.

2.3. Útreiðsluvøkstur.

Útrokningarnar byggja á, at almennu útreiðslurnar veksa 2 prosent realt um árið, t. e. 2 prosent meir enn inflatiónin. Orsøkin til at eg havi valt hetta sum útgangsstøði eru tvær.

Av samlaðu rakstrarútreiðslunum hjá landskassanum uppá 2750 mió. kr. hava 750 mió. kr. beinleiðis samband við talið av pensiónistum(pensiónsútreiðslur, ellisheim, heimarøkt, og sjúkrarøkt av pensiónistum). Næstu 16 árini veksur talið av pensiónistum við útvið 2 prosentum um árið, og ein má tí rokna við, at eldraútreiðslurnar veksa við umleið 2 prosentum árliga.

Av samlaðu útreiðslunum hjá landskassanum uppá 2750 mió. kr. eru 1450 mió. kr. lønarútreiðslur. Roknast má við einum ávísum reallønarvøkstri í Føroyum. Verður eingin reallønarvøkstur, so fer reallønin hjá føroyingum longur og longur afturum lønina í øðrum londum, og hetta førir til fólkafráflyting. Roknast má tí við einum árligum reallønarvøkstri uppá minst 1-1,5 prosent. Hetta merkir, at rakstrarútreiðslurnar av sær sjálvum fara at veksa við hálvumøðrum prosenti árliga. Samanumtikið verður tað tí eitt tógvið stríð, at halda reala útreiðsluvøksturin nógv undir 2 prosent.

Til samanberingar skal nevnast, at sitandi landsstýri hevur økt útreiðslur landskassans við 22 prosentum (5-600 mió. kr.) í 3 ár. Hetta er ein vøkstur uppá 7-8 prosent um árið. Tá inflatiónin er frároknað, hevur landsstýrið økt útreiðslurnar við umleið 5 prosentum um árið. Hetta er ein ótrúliga stór útreiðsluhækking, tá ein hugsar um, at talið av pensiónistum hevur verið stórt sæð óbroytt seinastu fimm árini.

2.4. Landskassaskuldin.

Undirritaði hevur sett sum fyritreyt, at skuldin eigur at verða avdrigin. Flestu lond rundanum okkum royna at fáa almennu skuldina burtur, áðrenn talið av pensiónistum veksur av álvara. Almennu útreiðslurnar fara at veksa skjótt, tá talið av pensiónistum fer at veksa. Talið av pensiónistum sum nú er 6200, verður um 9000 seinast 2020unum og fer upp um 10000 í 2030unum. Hetta førir við sær at realu útreiðslurnar av eldrabólkinum fer at veksa við útvið 500 mió. kr. Tað verður tí neyðugt at gjalda skuldina niður, áðrenn pensiónistabylgjan rakar føroyska búskapin miðskeiðis í 2020unum.

Tað skal viðmerkjast, landsstýrið kundi havt gjørt nakað við at minka um hesa útreiðsluhækking, við at gjørt lóg, ið álegði fólki at gera uppsparing til eldri ár. Av tí, at landsstýrið hevur valt ikki at gera nakað fyri at økja privatu samansparingina til pensiónsendamál, má landsstýrið hækka almennu uppsparingina, nevniliga við at gjalda almennu skuldina niður, og spara upp í landskassanum.

**3. Úrslitið: Ætlan landsstýrisins hongur ikki saman.**

Framrokningin vísir, at verður roknað við útreiðsluvøkstri uppá 2% árliga, so fær landskassin stór hall eftir stuttari tíð. Longu eftir 7-8 árum fær landskassin hall uppá 500 milliónir árliga, áðrenn avdráttir av skuld. Um skuldin verður avdrigin sum avtalað, verður hallið 700 milliónir.

Eftir 13-14 árum verður hallið um eina milliard árliga.

Framrokningin vísir harumframt, at sjálvt um landsstýrið klárar at halda útreiðslunum á sama støði sum nú (null-vøkstur), so kann føroyski búskapurin framvegis ikki vera ríkisveitingina heilt fyri uttan um ár 2015, t. d. klárar landskassin ikki at rinda niður uppá sína skuld.

**4. Hvat skal til fyri, at fullveldisætlan landsstýrisins skal kunna hanga saman ?**

Fyri at ætlan landsstýrisins skal hanga saman, so er neyðugt, at rakstrarútreiðslurnar als ikki veksa tey næstu 16 árini, og helst skula útreiðslurnar minka nakað.

Hetta verður sera torført at fremja í verki, tá ein hugsar um, hvussu nógv útreiðslur landskassans veksa sjálvt uttan at politisku myndugleikarnir taka støðu til henda útreiðsluvøkstur, t.d. hækkingarnar av eldraútreiðslunum.

**5. Hvat sigur landsstýrið at tað vil ?**

Landsstýrið sigur seg arbeiða fyri at gera føroyska búskapin sjálvberandi. Hetta er eitt mál sum flestu føroyingar taka undir við.

Landsstýrið ætlar at fremja hesa ætlan við at minka heildarveitingina úr einari milliard niður í einki og at fremja yvirtøkur uppá umleið 200 mió. kr., t. e. at minka ríkisveitingarnar við 1200 mió. kr. eftir 12 árum.

Men at minka ríkisveitingina ger ikki føroyska búskapin sjálvberandi. Um ein bert minkar ríkisveitingina og minkar um virksemið, førir hetta til arbeiðsloysi og fráflyting.

Tað sum er grundleggjandi skeivt við ætlanum landsstýrisins, er, at ein kann ikki minka ríkisveitingina uttan at hava nakað at seta í staðin. Landsstýrið eigur tí ikki at minka ríkisveitingina skjótari enn sjálvskapta virksemið í føroyska búskapinum kann setast í staðin.

Um landsstýrið veruliga ætlaði, at gera Føroyar óheftar av ríkisveitingini í ár 2015, so skuldi landsstýrið als ikki latið útreiðslurnar vaksið. Um landsstýrið ætlaði at gera óheftar av ríkisveitinigini í ár 2030, so hevði landsstýrið ikki latið útreiðslurnar vaksið við meira enn 1 prosent árliga.

**6. Hví gera føroyska búskapin minni heftan av ríkisveitingini ?**

Hóast eg ikki taki undir við ætlan landsstýrisins um at gera Føroyar til fullveldi, taki eg fult undir við at gera føroyska búskapin minni heftan av ríkisveitingini.

Hóast ein ikki tekur undir við fullveldisætlanum landsstýrisins hava føroyingar eitt áhugamál í at gera búskapin meir sjálvbjargnan fyri at kunna minka (nakað) um ríkisveitingina. Ein orsøk er, at hvørja ferð føroyska tjóðarúrtøkan (BTÚ) kemur upp í móti tjóðarúrtøkuni í Danmark so fer hetta at føra til eitt krav um minkandi ríkisveiting. Orsøkin er tann heilt einfalda, at um Føroyar hava eina tjóðarúrtøku, sum er eins høg og hon í Danmark, so merkir hetta at Føroyar eru ríkari enn tey fátækastu donsku amtini. Eingin kann rokna við, at danskir politikarar kunnu veljast uppá, at krevja skatt frá fátækum dønum og senda peningin upp til ríkar føroyingar.

Hin orsøkin er, at eldrabylgjan rakar í Danmark um eini 15-20 ár(nakað fyrr enn í Føroyum). Hetta fer at føra til ein so stóran fíggjartørv í Danmark, at tað so við og við verður torførari at senda eina stóra ríkisveiting til Føroya.

Føroyingar hava tí eitt sterkt búskaparligt eginháhugamál í so líðandi gera føroysku vælferðina meira og meira óhefta av ríkisveitingini.

**7. Hvat ger landsstýrið í veruleikanum ?**

Sum nevnt omanfyri, so hevur landsstýrið í hesum valskeiði økt útreiðslurnar hjá landskassanum við umleið 600 mió. kr., tað er við 22 prosentum í trý ár. Hetta eru 7-8 prosent um árið og um inflatiónin verður frároknað, er talan um ein realvøkstur í almennu nýtsluni uppá umleið 5 prosent árliga. Harvið hevur landsstýrið gjørt Føroyar munandi meir heftar av ríkisveitingini.

Sum nevnt omanfyri, so er kravið, at rakstrarútreiðslurnar ikki mugu veksa við meir enn 1 prosenti árliga, um føroyski búskapurin skal gerast óheftur av veitingum uttanífrá um 25-30 ár.

**8. Hvat átti landsstýrið at gjørt ?**

Tað, sum er hent seinastu trý árini er rætt og slætt syrgiligt, uttan mun til um ein tekur undir við fullveldinum ella ikki. Landsstýrið hevur sjálvt mótarbeitt møguleikunum at gera føroyska búskapin sjálvberandi, so tað er torført at taka alt tos hjá landsstýrinum um sjálvbjargni í álvara.

Undirritaði skal tó kortini gera landsstýrinum eitt stutt tilmæli.

Tilmæli:

Fyri at gera føroyska búskapin meir sjálvberandi er í fyrsta lagi neyðugt, at útvega føroyska samfelagnum eitt meir fjøltáttað vinnulív, so vit hava minst tríggjar útflutningsvinnur. Tað er framvegis soleiðis, at um ríkisveitingin verður avtikin, og føroyska samfelag bert skal liva av at útflyta fisk, so verður búskapurin alt ov viðbrekin, og alt samfelagið verður rakt av eini svárari kreppu, hvørja ferð fiskanøgdir ella -prísir falla. Føroyska samfelagið hevur í so máta lítil og eingi framstig gjørt undir hesum landsstýrinum.

Í øðrum lagi eigur landsstýrið at konsolidera landskassan og gjalda skuld landskassans, og syrgja fyri, at landskassin fær eina nettouppsparing í staðin fyri skuld, áðrenn stóru árgangirnir gerast pensiónistar í 2020unum.

Í triðja lagi eigur landsstýrið at seta sær ein meira realistiskan málsetning, t. d. at gera føroyska búskapin óheftan av ríkisveitingini um 25-30 ár, og gera tað sum so er neyðugt, í hesum føri at halda útreiðsluvøksturin undir 1 prosent árliga. Eitt annað alternativ er at minka um ríkisveitingina, so hvørt sum føroyski búskapurin veksur, men framvegis halda útreiðsluvøksturin undir 1 prosent árliga.

*Framhald á síðu 26*